TILFAR

Norðurlendskt samstarv

# Saman fram ímóti eini altjóða avtalu

## FYRI NÁTTÚRU OG FÓLK

**Ungdómsluttøka í áseting av málum fyri lívmargfeldi, vistskipanum og burðardyggari nýtslu**



**Saman fram ímóti eini altjóða avtalu fyri náttúru og fólk**
**Ungdómsluttøka í áseting av málum fyri lívmargfeldi, vistskipanum og burðardyggari nýtslu**

Nord 2019:050
ISBN 978-92-893-6371-6 (PDF)
ISBN 978-92-893-6372-3 (EPUB)
http://dx.doi.org/10.6027/NO2019-050

© Norðurlendska samstarvið 2019

Sniðgáva: Gitte Wejnold, Louise Jeppesen, Erling Lynder
Myndir: Unsplash.com

**Norðurlendska samstarvið**
Norðurlendska samstarvið er eitt tað víðfevndasta økissamstarvið í heiminum. Samstarvið fevnir um Danmark, Finnland, Ísland, Noreg, Svøríki og Føroyar, Grønland og Áland.

Norðurlendska samstarvið er politiskt, búskaparliga og mentanarliga kjølfest, og tað er týðandi partur í evropiskum og altjóða samstarvi. Norðurlendski felagsskapurin virkar fyri sterkum Norðurlondum í einum sterkum Evropa.

Norðurlendska samstarvið vil styrkja áhugamál og virði hjá Norðurlondum á øllum økjum í einum altjóðagjørdum umheimi. Felags virði landanna millum eru við til at styrkja støðu Norðurlanda sum eitt av heimsins mest nýhugsandi og kappingarførastu økjum.

**Norðurlandaráðið**
**Nordens Hus**
**Ved Stranden 18**
**DK-1061 København K**
**www.norden.org**

Tak niður norðurlendskar útgávur: www.norden.org/nordpub

TILFAR

# Saman fram ímóti eini altjóða avtalu

## FYRI NÁTTÚRU OG FÓLK

**Ungdómsluttøka í áseting av málum fyri lívmargfeldi, vistskipanum og burðardyggari nýtslu**


**Høvundar:** Christian Prip (Fridtjof Nansen Institutt, Noreg), Thor Hjarsen (Verdensnaturfonden, Danmark), Bjørn Bedsted (Fonden Teknologirådet, Danmark) og Mette Gervin Damsgaard (Norðurlandaráðið).

**Ritstjórn:** Mette Gervin Damsgaard (Norðurlandaráðið), Eva Juul Jensen (Norðurlendska ráðharraráðið), Sigga Jacobsen (Norðurlendska ráðharraráðið), Melina Sakiyama (Global Youth Biodiversity Network), Tine Svendsen (Den Grønne Studenterbevægelse), Gustaf Zachrisson (lærlingur á Naturskyddsföreningen, Svøríki), Karolina Lång (Norðurlendska ungdómsráðið), Nicholas Kujala (Norðurlendska ungdómsráðið), Elva Hrönn Hjartardóttir (Norðurlendska ungdómsráðið), Annika Lepistö, Lovisa Roos (Feltbiologerne, Svøríki), Monika Skadborg (Klimarådet, Danmark), Ann-Katrine Garn (Forkvinna – IUCN Landsnevnd Danmarkar) og Christa Elmgren (Norðurlendska ungdómsráðið)

"Við nýggju altjóða avtaluni um lívmargfeldi hava vit ein møguleika at tryggja rættvísi tvørtur um ættarlið. Latið okkum byrja við at savnast sum ein máttmikil rødd."

GUSTAF ZACHRISSON, LÆRLINGUR,
NATURSKYDDSFÖRENINGEN, SVØRÍKI

# Innihald


7 EIN NÝGGJ AVTALA FYRI NÁTTÚRU OG FÓLK

11 1. partur
**SVINNIÐ Í LÍVMARGFELDI – HVAT STENDUR Í VÁÐA?**
20 **SPURNINGAR**

23 2. partur
**ALTJÓÐA MÁL FYRI LÍVMARGFELDI**
30 **SPURNINGAR**

33 3. partur
**UNGDÓMSLUTTØKA OG ÁBYRGD**
35 **SPURNINGAR**

37 4. partur
**SAMBANDIÐ MILLUM LÍVMARGFELDI OG VEÐURLAGSBROYTINGAR**
41 **SPURNINGAR**

43 5. partur
**AMBOÐ TIL AT FREMJA EINA NÝGGJA AVTALU FYRI NÁTTÚRU Í VERKI**
45 **SPURNINGAR**

46 Tilmælispartur

47 ÍSKOYTISSPURNINGAR
**EFTIRMETINGARPARTUR**





**Handbók: hvussu ungdómssamráðingar verða skipaðar**
**Saman fram ímóti eini altjóða avtalu fyri náttúru og fólk**
http://urn.kb.se/resolve?urn=urn:nbn:se:norden:org:diva-5689


We must change
for the ENVIRONMENT
without the ENVIRONMENT
There is no WE.

# Ein nýggj avtala fyri náttúru og fólk

## Formæli til tilfar

**Hetta er ein møguleiki hjá tær, vinum og netverki tínum at luttaka og geva eitt íkast til altjóða samráðingarnar um lívmargfeldi, ið júst nú eru á breddanum.**

### Hvat er hetta?

Vælkomin til tilfarið, ið er ætlað at økja um ungdómsluttøkuna í arbeiðinum við at seta nýggj mál fyri vernd og burðardygga nýtslu av lívmargfeldi og vistskipanum og harvið tryggja eina nýggja altjóða avtalu fyri náttúruna og heimsins íbúgvar! Hetta tilfar er ætlað ungdómi og teimum, ið vilja skapa karmar um ungdómsluttøku í tilevningini av eini nýggjari altjóða avtalu fyri náttúru og fólk. Øll, ið vilja skipa fyri, hjálpa til og vera við í ungdómssamráðingum, eru vælkomin at nýta tilfarið. Úrslitið kann varpast víðari til teir myndugleikar, ið taka stóru avgerðirnar, til almenningin og til aðrar viðkomandi stovnar, eins og tað verður partur av eini størri, heimsfevnandi ungdómsrørslu.

Ein nýggj avtala fyri náttúru og fólk verður væntandi samtykt við árslok 2020. Meira kunning um gongdina og ungdómsluttøkuna, er á hesum leinkjum.

Fyri meira kunning um altjóða gongdina, sí **https://www.cbd.int/conferences/post2020**

Fyri meira kunning um altjóða kervið av ungdómsfelagsskapum, *Global Youth Biodiversity Network*, sí **https://www.gybn.org/**

Fyri gjøllari leiðbeining viðvíkjandi fyriskipan av ungdómssamráðingum, sí handbókina *Manual for organizing youth consultations – Together towards a global deal for nature and people* - http://urn.kb.se/resolve?urn=urn:nbn:se:norden:org:diva-5689

Við at lesa ígjøgnum tilfarið, svara spurningunum og við at skipa fyri og luttaka í ungdómssamráðingum kanst tú gerast partur av samráðingunum um eina nýggja altjóða avtalu fyri náttúru og fólk og harvið tryggja, at tín rødd eisini verður hoyrd av heimsins stjórnum og leiðarum.

**Vit vóna, at tú vilt vera við. Tað er neyðugt – tí hetta er eisini tín framtíð.**

### Hvat stendur í váða?

Lívmargfeldið, ið fevnir um vistskipanir, djóra-/plantusløg og ílegutilfeingi, svinnur støðugt um allan heim, frá norðpólinum til tropuskógirnar og frá korallrivunum til víða havið. Summi vilja vera við, at sætta hópoyðingin av djóra- og plantusløgum stendur fyri durum – ein oyðing á støðd við seinastu hópoyðing, ið var fyri uml. 65 milliónum árum síðan, og sum gjørdi enda á dinosaurunum. Sum nú er, doyggja vill djóra- og plantusløg út 100-1000 ferðir skjótari enn tað, ið "natúrligt" er. Og hesa ferð er tað av mannaávum.

Hetta er ein heimsfevnd avbjóðing, ið er eins stór og avbjóðingin við veðurlagsbroytingum. Doyggja djóra- og plantusløg og vistskipanir út, koma tey ongantíð aftur.

Londini, ið hava skrivað undir *ST-sáttmálan um lívfrøðiligt margfeldi* (CBD-sáttmálan), skulu hittast í býnum Kunming í Kina í oktober 2020 at samráðast um eina nýggja altjóða avtalu fyri náttúruna til tess at venda gongdini og steðga týningini av búøkjum og vistskipanum. Úrslitini av virkseminum, ið hetta tilfar leggur upp til, skulu nýtast beinleiðis í hesi tilgongd.

Víddin og vavið á nýggju altjóða avtaluni verða avgerandi fyri lívsgrundarlagið hjá komandi ættarliðum og umstøðum náttúrunnar. Tí hevur tað alstóran týdning, at ungdómurin sleppur til orðanna við sínum hugskotum og íkasti til hesa nýggju avtalu, eisini í sambandi við at seta nýggj mál fyri vernd av lívmargfeldi.

## Hví tørvar okkum altjóða mál fyri lívmargfeldi?

CBD-sáttmálin varð skrivaður í 1992 við tí endamáli at verja lívmargfeldi og varðveita vistskipanir. Hóast royndir eru gjørdar at verja og røkja lívmargfeldi á burðardyggan hátt, vísa metingar, at heimurin er langt frá málinum at steðga svinninum í lívmargfeldi og týningini av vistskipanum á jørðini.

Hetta varð seinast skjalprógvað av altjóða nevndini fyri lívfrøðiligt margfeldi, IPBES, í altjóða frágreiðing teirra frá mai 2019 (https://www.ipbes.net/global-assessment-report-biodiversity-ecosystem-services).

**Okkum tørvar títt íkast fyri at orða hesa nýggju avtaluna fyri náttúru og fólk og seta nýggj mál!**

Í 2010 samtyktu tey 196 londini, ið hava skrivað undir CBD-sáttmálan, eina víðfevnda virkisætlan og 20 mál fyri lívmargfeldi – tey sonevndu Aichi-málini. Virkisætlanin verður nevnd 'Virkisætlan fyri lívmargfeldi 2011-20' (the Strategic Plan for Biodiversity 2011–20).

Men verandi Aichi-málini fara úr gildi í 2020, og ein *nýggj avtala fyri náttúru og fólk* við nýggjum málum verður samtykt í 2020.

## Hvussu skal hetta tilfar nýtast?

Tú kemur við í eina víðfevnda altjóða tilgongd at orða nýggju avtaluna saman við luttakarum úr øllum heiminum.

Í tilfarinum eru dagførdar upplýsingar um lívmargfeldi, um hvussu CBD-sáttmálin virkar, og um hvussu hann verður framdur í verki. Eitt yvirlit er eisini yvir aðalmál og tvístøður, ið skulu viðgerast í sambandi við áseting av nýggjum málum fyri lívmargfeldið.

Í hvørjum parti í tilfarinum eru støðisupplýsingar og eitt spurnablað. Spurningarnir snúgva seg um verandi raðfestingar og trupulleikar, og tú verður vegleidd/ur ígjøgnum teir. Tú kanst útgreina øll tíni svar í teiginum '*Hví?*'.

## Hvussu lata vit okkara svar inn?

Ert tú úr einum av Norðurlondum (Grønlandi, Álandi, Íslandi, Svøríki, Føroyum, Finnlandi, Noregi ella Danmark), vinaliga send svarini til **youthinput@us.fo**




## Hvussu verður okkara íkast nýtt?

Norðurlandaráðið og Norðurlendska ráðharraráðið hava ábyrgd av tilfarinum, og tey skulu savna inn og viðgera frágreiðingarnar frá verksmiðjunum, ið hava verið í Norðurlondum.

Ein samanrunnin frágreiðing við ungdómstilmælum til eina altjóða avtalu fyri náttúru og fólk verður skrivað við støði í úrslitunum frá ungdómssamráðingunum um øll Norðurlond. Ein ungdómssendinevnd, ið umboðar øll Norðurlond, skal nýta samanrunnu frágreiðingina beinleiðis í samráðingunum um eina nýggja avtalu fyri náttúru og lívmargfeldi.

Samanrunna frágreiðingin skal eisini leggjast fram fyri Norðurlendska ráðharraráðið og Norðurlandaráðið.

Samanrunna frágreiðingin verður tøk á **www.norden.org**.

Tey, ið búgva uttan fyri Norðurlond og vilja skipa fyri, hjálpa til og luttaka í ungdómssamráðingum, eru vælkomin at nýta tilfarið. **Úrslitið kann varpast víðari til teir myndugleikar, ið taka tær** stóru avgerðirnar, til almenningin og til aðrar viðkomandi stovnar, harímillum CBD-sáttmálan, eins og tað verður partur av eini størri, heimsfevnandi ungdómsrørslu.

## Hvør stendur fyri hesum tilfari?

Norðurlandaráðið og Norðurlendska ráðharraráðið í samstarvi við norðurlendskan ungdóm.



" Fleiri og fleiri froskasløg doyggja út. Frá 1900 til dagin í dag hevur tað gingið tíggju ferðir skjótari enn undanfarnu hundrað árini"

1. partur

# Svinnið í lívmargfeldi – Hvat stendur í váða?

1. partur

# Svinnið í lívmargfeldi – Hvat stendur í váða?

## Hvat er lívmargfeldi?

Lívfrøðiligt margfeldi, stytt lívmargfeldi, er lívskervið sjálvt: undirstøðukervið undir øllum lívi frá ílegum og kromosomum til soppar, plantur, djór og vistskipanir á landi, feskvatni og í sjónum. Øll hesi eru partar av eini heildarskipan og treytað hvør av øðrum í einum ótroytandi kervi av samansettum og fjøltáttaðum vistfrøðiligum samstarvi og sambondum.

Hetta kervið er í støðugari broyting. Við tíðini mennist tað dúgliga, men samstundis varðveitir

### KASSI 1

#### Lívmargfeldar vistskipanir á landi og sjógvi

**Natúrligir skógir** fevna um ein knappan triðing av jarðarskorpuni og hýsa nógvum lívmargfeldi á landi.

- Mett verður, at umleið helvtin av heimsins djóra- og plantusløgum livir í skógarlendi, serliga í frálíka gróðrarríku tropuskógunum.
- Stórur munur er á frumskógum, nýhøgdum og afturkomnum ella plantaðum skógum.
- Skógir eru eisini millum heimsins týdningarmesta varandi náttúrutilfeingi fyri menniskju, tí teir veita timbur til brenni, byggitilfar og pappír eins og aðrar vørur, ið ikki eru úr viði.
- Umleið 240 milliónir fólk búgva í skógarøkjum, og lívsgrundarlagið hjá nærum 1,6 milliardum fólkum – meira enn 25% av heimsins íbúgvum – er treytað av tilfeingi úr skógunum.

**Korallriv** eru havsins skógir, hvat lívmargfeldi viðvíkur.

- Tey eru lívsgrundarlagið hjá fiski, tey verja ímóti náttúruvandum, og tey stýra veðurlagnum á staðnum. Umleið ein hálv milliard  fólk dúva upp á korallriv búskaparliga gjøgnum til dømis fiskiveiðu og ferðavinnu.
- Korallriv verja nærum 200 milliónir fólk ímóti flóðaldum og brotasjógvi.
- Eftir einari meting (2003) er árligi nettovinningurin frá heimsins korallrivum samanlagt verdur 29,8 milliardir dollarar.
- 9,6 av hesum milliardum stava frá ferðavinnu og frítíðarítrivi. Strandaverjan er 9 milliardir dollarar verd, fiskivinnan 5,7 milliardir dollarar og lívmargfeldið 5,5 milliardir dollarar. Hetta er beinleiðis vinningurin, men samstundis hevði tað eisini verið kostnaðurin fyri at veitt slíkar tænastur ella fyri at veitt endurgjald fyri tað sama.



tað heildina í skipanini, ið veitir allar tær grundleggjandi tænasturnar, sum livandi verum tørvar fyri at trívast á jørðini.

Lívmargfeldi er lív.

Vísindini lýsa lívmargfeldi í trimum stigum:

1. Vistskipanir (øll sløg av villari náttúru, til dømis skógir, oyðimerkur, korallriv osfr.)
2. Djóra- og plantusløg (ein bólkur av livandi verum við líknandi einstaklingum, ið kunnu býta ílegur sínámillum ella fáa avkom saman)
3. Ílegumargfeldi (margfeldið í íleguupplýsingunum hjá villum djóra- og plantusløgum. Hetta margfeldið er drívmegin aftan fyri menning og kann standast av úrbregði, umhvørvisávum ella kapping millum djóra-/plantusløg.)

Jú størri margfeldi og fjøltáttaðar verur, tess størri lívmargfeldi. Vanliga hava hitaøki so statt størri lívmargfeldi enn kuldaøki – men allar livandi verur allastaðni hava lagað seg til natúrliga umhvørvið, tær liva í, og tær eru tengdar hvør at aðrari á serstakan hátt eftir støðuga menning í milliónir av árum.

Hóast lívmargfeldi er allastaðni á jørðini, er ikki eins nógv av tí í øllum økjum. Summi øki hava eina ørgrynnu av djóra- og plantusløgum, onnur hava nógv djóra- og plantusløg í avmarkaðari nøgd, og tí eru hesi sløgini serliga viðkvom, um búøki verða týnd í lítlu økjum teirra. Slík øki – sonevndir *lívmargfeldisbrennideplar* – eiga friðingarmyndugleikar at raðfesta.

Vísindafólk hava til dømis eyðmerkt 25 lívmargfeldisbrennideplar á landi og í sjónum, sum hava týdning í heimshøpi vegna óvanliga stóra nøgd av staðbundnum djóra- og plantusløgum umframt óvanliga nógva búøkistýning.

## Hví er lívmargfeldi umráðandi?

Høvdu vit ikki skordýr og onnur smákykt, ið gita blómurnar og so statt eru lívsgrundarlagið undir frukt og fræi, høvdu flestu fruktir, grønmeti og

nøtir doyð út. Einki kaffi hevði verið um morgnarnar, um skordýr og onnur smákykt, ið gita blómurnar, hvurvu!

Menniskju, eins og øll heimsins djóra- og plantusløg, eru liður í hesum fløkta lívskervi. Vit eru tongd at tí, og tilvera okkara er treytað av máttinum í hesi lívgandi skipan – fyri at fáa ráevni, vatn, mat, heilivág og orku, fyri at gita ávísa grøði, endurnýggja moldina og verja okkum ímóti vatnflóðum, illveðri og máan, men eisini fyri ítriv, íblástur og átrúnaðarligt virksemi.

Hetta samstarv millum livandi lívmargfeldi og vatn, mineral og veðurlag veitir nakrar grundleggjandi tænastur og leggur lunnar undir framleiðslu, handil, lívsuppihald og nýtslu í øllum londum (sí Kassa 1).

Lívmargfeldi hevur eisini virði í sjálvum sær. Mestsum allar mentanir virðismeta náttúruna vegna siðvenju, átrúnað ella aðrar andaligar sannføringar. Nógv fólk kenna tað sum eina moralska skyldu at handa børnum sínum sama heim og náttúru, ið teimum varð givin, og halda, at onnur djóra- og plantusløg hava rætt at liva, sama um menniskjum tørvar tey ella ikki.

Virðið á lívmargfeldi kann sostatt vera torført at áseta, og nógv verður eisini kjakast um tær virðismetingar, ið verða gjørdar. Hvat er til dømis virðið á einum ávísum vøkrum firvaldaslagi í mun til virðið á einum stórum troputræi, ið kann nýtast sum timbur? Harumframt samsvarar nýtslan ikki altíð við framleiðsluna, hvat náttúrunnar íkast til lívsgóðskuna hjá okkum menniskjum viðvíkur.

Framleiðsla av til dømis mati, fóðri, viði og lívfrøðiligari orku kann lættliga elva til týning av skógum, korallrivum og øðrum lívmargfeldum økjum, um hon ikki verður framd á burðardyggan hátt. Satt at siga eru umskipanin og týningin av búøkjum, ið vit fremja, høvuðsorsøkin til svinnið í lívmargfeldinum, og nú síggja vit árinini.

**Uttan "menniskjað" – virðið í lívmargfeldinum sjálvum**

- Tað, ið nakar veit, er jørðin einasta stað í alheiminum, ið hýsir lívi – t.e. lívmargfeldi.
- Fuglar, plantur, firvaldar, froskar og trø eru øll serstakar og ómissandi verur, ið vit liva saman við á hesi klótu, og tey hava øll sama rætt at vera her sum vit menniskju. Doyggja tey út, koma tey ongantíð aftur í sama skapi.
- Lívmargfeld øki, t.e. øki við stórum ílegumargfeldi, eru við til at styrkja lívmargfeldið sjálvt og tryggja, at tað støðugt mennist.
- Vistskipanir og djóra- og plantusløg eru treytað hvør av øðrum bæði í støðugum skipanum og í óstøðugum skipanum eftir náttúruvanlukkur osfr.

**Við "menniskjanum" – virðið í lívmargfeldinum fyri menniskju (Kelda: IPBES, 2019):**

- Brenniviður er høvuðsorkukelda hjá meira enn 2 milliardum fólkum.
- Umleið 4 milliardir fólk nýta fyrst og fremst náttúruheilivág til heilsurøkt.
- 70% av heilivágínum, ið nýttur verður at basa krabbameini, er náttúruvøra ella eftirgjørd vøra við íblástri úr náttúruni.
- 75% av matvørum frá plantuavgrøði er treytað av at djór dusta planturnar.
- Vistskipanir á landi og í sjónum eru binda $CO_2$. Árliga binda tær 5,6 milliardir tons av kolevni, ið svarar til 60% av øllum kolevnisútláti, ið stendst av mannaávum.

## Hvussu veit lívmargfeldinum við, og hvat stendur í váða?

Í mai 2019 gjørdi altjóða nevndin fyri lívfrøðiligt margfeldi (IPBES) – ofta kallað 'IPCC fyri lívmargfeldið' – eina altjóða frágreiðing um lívmargfeldi og tænastur frá vistskipanum, ið higartil er mest víðfevnda frágreiðing av sínum slag. Niðanfyri eru dømi um nakrar av mest ørkymlandi niðurstøðunum í frágreiðingini:




**Mynd 1.** Ágóðar frá náttúruni
(Kelda: WWF Living Planet Report, 2018)

- Sannlíkt er, at økt ferð kemur á verandi náttúrutýning, og harvið verður upp í ein millión av heimsins djóra- og plantusløgum, sum í løtuni verða mett at vera uml. átta milliónir í tali, oydd – nógv av hesi oyðing væntast innan fá áratíggju. Sløgini, ið hvørva, koma ongantíð aftur.
- Miðaltalið av uppruna djóra- og plantusløgum í flestu stóru búøkjum á landi er fallið í minsta lagi 20%, einamest síðan 1900.
- Meira enn 40% av paddusløgum (froskum og salamandrum), næstan 33% av koralldýrum, ið byggja korallriv, og meira enn ein triðingur av øllum havsúgdjórum eru hótt. Niðurstøðurnar viðvíkjandi skordýrum eru ikki eins greiðar, men tøku upplýsingarnar benda á, at møgulig 10% eru hótt. Minst 680 ryggdýr (djór við ryggjargeislum) eru týnd síðan 16. øld, meira enn 9% av øllum húsdjórum, ið eru nýtt í landbúnaði og til matna, vóru horvin í 2016, og minst 1000 onnur djórasløg eru framvegis hótt. (Sí Mynd 3).
- Ovurfisking ella svinn av øðrum orsøkum rakar meira enn 90% av stóru fiskastovnunum.
- 85% av øllum vátlendi er horvið, t.e. mýrilendi, vøtn, løkir, áir, pollar osfr.
- Frá 2010 til 2015 hvurvu meira enn 32 milliónir hektarar av villum tropuøki.
- Menniskju blaka árliga upp í 400 milliónir tons av tungmálmi, eiturevju og øðrum burturkasti í høv og áir.
- Tríggir fjórðingar av umhvørvinum á landi og uml. 66% av havumhvørvinum er broytt munandi av menniskjaligum virksemi. Í miðal hevur hetta rák havt minni ella onga ávirkan í økjum, har upprunafólk og smærri fólkabólkar búgva í ella røkja.
- Landbúnaður og matframleiðsla eru serliga oyðandi. Tey standa fyri einum triðingi av allari lendisnýtslu, 75% av nýtsluni av




**Mynd 2.** Týningin av úrvaldum djórabólkum tey seinastu 500 árini (Kelda: IPBES, 2019)

feskvatni og einum fjórðingi av øllum útláti av vakstrarhúsgassi.

- Jarðargóðskan er versnað, so hvørt nýtslan av taðingarevnum er økt: tey seinastu 13 árini er hendan nýtsla ferfaldað í Asia, og á heimsstigi er hon tvífaldað síðan 1990.
- Tøðevni, ið eru runnin út í vistskipanir við strendur, hava elvt til meira enn 400 'deyð øki'.
- So hvørt jarðargóðskan er versnað, er grøðin eisini fallin í 23% av heimsins lendi.
- Býarøki eru meira enn tvífaldað síðan 1992.
- Plastdálking er tíggjufaldað síðan 1980.
- Sannlíkt er, at neiliga rákið í náttúruni heldur fram til 2050 og longur, tó í sera ymiskan mun í ymsu økjunum.

Summi vilja vera við, at sætta hópoyðingin av djóra- og plantusløgum stendur fyri durum, nú vill djóra- og plantusløg doyggja út 100-1000 ferðir skjótari enn tað, ið "natúrligt" er.

## Hví hvørvir lívmargfeldið?

Virksemið og fyribrigdini aftan fyri svinnið í lívmargfeldi kunnu í høvuðsheitum býtast í beinleiðis og óbeinleiðis atvoldir:

**Beinleiðis atvoldir (dømi)**

Hetta eru fyribrigdi ella virksemi, ið beinleiðis týna lívmargfeldi og vistskipanir. Til dømis:

- Menniskjalig lendis- og vatnnýtsla, ið týnir skóg, korallriv og aðrar lívmargfeldar vistskipanir til gagns fyri landbúnað, havbúnað og aðra framleiðslu (Mynd 3).
- Ovurnýtsla av náttúrutilfeingi – serliga fiskastovnum og villskógi.
- Dálking av vistskipanum, til dømis við taðingarevni og plasti.

- Altjóðagerð, ið flytur djóra- og plantusløg úr einari vistskipan í aðra, har tey ikki hoyra heima, og tí gera innrás (innræsin djóra-/plantusløg).
- Veðurlagsbroytingar, ið bæði ávirka lívmargfeldi beinleiðis og økja um hinar vandarnar.

### Óbeinleiðis atvoldir (dømi)

Allar óbeinleiðis atvoldir til lívmargfeldissvinn eru fylgjur av, hvussu vit menniskju bæði liva nú á døgum, og hvussu vit hava livað undanfarnu árini, til dømis av úrdrátti og framleiðslu, ið eru økt so hvørt, sum okkara nýtsla og handil eru økt:

- Altjóða búskapurin er næstan ferfaldaður, og altjóða handilin er tíggjufaldaður, og saman økir hetta um orku- og tilfeingiseftirspurningin.
- Altjóða frágreiðingin hjá IPBES frá 2019 avdúkar, at lívmargfeldisskrædlið fyrst og fremst stendst av landbúnaðinum, sum skal nøkta okkara vaksandi tørv á kjøti og harvið hevur elvt til stórar broytingar í og avskeplan av náttúruøkjum.
- Fólkavøkstur. Heimsins íbúgvatal er tvífaldað seinastu hálvtrýss árini.
- Búskaparskipan og lóggáva hava eggjað til náttúrutýning fram um náttúruvernd og -umvæling.

### Hvat kann gerast?

Sambært altjóða frágreiðingini hjá IPBES er bráðneyðugt at skipa ein burðardyggan altjóða búskap, ið skiftir kós burtur frá snævurskygdu strembanini eftir búskaparvøkstri. Sum liður í hesum grundleggjandi skifti mælir frágreiðingin til at:




**Mynd 3.** Dømi um afturstig í náttúruni á heimsstigi við denti á svinn í lívmargfeldi, sum framhaldandi beinleiðis og óbeinleiðis atvoldir eru til. Undir beinleiðis atvoldunum (broytingum í land- og havbúnaði, beinleiðis troyting av verum, veðurlagsbroytingum, dálking og innræsnum djóra-/plantusløgum) búgva alskyns samfelagsviðurskifti og -mál (Source: IPBES, 2019)

- løna umhvørvisvinaligari framleiðslu innan landbúnað, fiskivinnu og aðrar vinnur;
- forða fyri, at "óvinalig" framleiðsla kann loysa seg;
- fara varligari fram fyri at tryggja, at vistskipanir eru mótstøðuførar í tí óvissu og ruðuleika, ið væntast frá veðurlagsbroytingum og øðrum hóttanum sum til dømis innræsnum djóra- og plantusløgum;
- styrkja lóggávu og politikk kring lívmargfeldið og útinnanina av hesum eins og rættartrygdina sum heild.

## Óbeinleiðis loysnir sambært altjóða frágreiðing IPBES frá 2019

Hóast náttúrutænasturnar eru ómissandi fyri samfelagið, og altjóða virði teirra er umleið 125 billiónir dollarar, tykjast flest fólk at halda tær vera ókeypis. Sambært IPBES-frágreiðingini er hetta eitt dømi um eggjan til skaðiligt virksemi, sum elvir til ovurnýtslu og týning av vistskipanum.

Higartil hevur búskaparskipan okkara sambært frágreiðingini hvørki endurspeglað stóra virðið í náttúruni og lívmargfeldinum ella høga kostnaðin av at týna tað. Náttúruvernd er komin í aðru røð aftan á meiri stuttskygd mál sum til dømis at skapa búskaparvøkstur og arbeiðspláss, at økja um kappingarførið hjá vinnuni og at halda prísum niðri.

So við og við eru politikarar og vinnulívsfólk eins og fíggjarheimurin farin at seta spurnartekn við, hvørja ávirkan altjóða rák viðvíkjandi umhvørvi fara at hava á búskapin í londum og økjum og harvið eisini á fíggjarmarknaðin.

| **Loysnir** | **Møguligar leiðir** |
|---|---|
| Steðga svinninum í lívmargfeldi | - Lívmargfeldisvernd<br>- Betri lívmargfeldisvernd við størri og munabetri verndarskipanum, ið tryggja, at náttúruøki fáa frið; víðfevnd umvæling av oyðiløgdum lendi; endurbøting av lívmargfeldi, har broyting í lendinum ikki slepst undan |
| Nýggir livihættir, harímillum munandi minking í tilfeingi fyri hvønn íbúgva | - Lágnýtslulívsstílur<br>- Minkað nýtsla fyri hvønn íbúgva, harímillum umlegging í kostvanum til meira grønmeti, ið krevur minni av jørðini, og bústaðir, ferðing og ídnaðarskipanir við lág- og varandi orkuloysnum |
| Steðga fólkavøkstrinum | - Nullhugsjón í altjóða fólkavøkstri<br>- Betra um javnstøðuna millum kynini, um undirvísing,sjálvbodna barnaavmarking og um almannahjálp |
| Minka munandi um burturkast, harímillum plast, og endurnýta tilfeingi | - Ringbúskapur<br>- Minni matoyðsl og -spill; burðardyggar rusk- og kloakkskipanir og endurnýtsla |
| Meira gagn úr minni tilfeingi | - Framleiðsluskipanir og umsiting av tilfeingi við minni inntaki<br>- Mat-, orku- og onnur vøruframleiðsla, ið krevur minni lendi, orku, vatn og annað tilfar og elvir til minni útlát |
| Umhvørvisvinaligari gagnnýtsla av náttúruni | - Burðardygg jarðarumsiting |

(Kelda: IPBES, 2019)

1. partur

# Spurningar

## Svinnið í lívmargfeldi – Hvat stendur í váða?

**Hvussu stúrin ert tú um svinnið í lívmargfeldi?**

- Sera stúrin
- Eitt sindur stúrin
- Ikki stúrin
- Veit ikki / Vil ikki svara

**Strika undir útsagnirnar, ið eftir tínum tykki eru týdningarmestu grundgevingarnar fyri at steðga svinninum í lívmargfeldi**

- Eg haldi, at lívmargfeldi er vakurt
- Eg haldi, at lívmargfeldi hevur rætt til at vera til
- Okkum tørvar lívmargfeldi til matna
- Eg haldi, at lívmargfeldi er umráðandi fyri at avmarka og laga okkum til veðurlagsbroytingar
- Okkum tørvar lívmargfeldi til búskaparvøkstur
- Alt omanfyri

Hví?

**Um stríð tekur seg upp millum búskaparvøkstur og vernd av lívmargfeldi og vistskipanum, hvat, heldur tú so, skal raðfestast fremst?**

- Vernd av burðardyggari nýtslu av lívmargfeldi og vistskipanum
- Javnvág millum vernd av lívmargfeldi og vistskipanum og búskaparvøkstur
- Búskaparvøkstur

Hví?

**Hvussu skal ábyrgdin av at varðveita lívmargfeldi býtast millum lívmargfeld lond og búskaparliga rík lond?**

- Rík lond skulu gjalda fyri varðveitsluna av lívmargfeldi í menningarlondum
- Tað er ein altjóða ábyrgd at varðveita lívfargfeldið í menningarlondum
- Hvørt einstakt land hevur egna ábyrgd av at varðveita sítt lívmargfeldi
- Fyritøkur úr ríkum londum, ið nýta/troyta tilfeingi í lívmargfeldum økjum, mugu taka ábyrgd
- Privati geirin

Hví?

→ **Leinki til talgilt spurnablað til 1. part**
**https://nmrnr.wufoo.com/forms/z1vqowy90jme6i2/**

### Kjak: Hvussu skulu vit fáa bilbugt við beinleiðis atvoldirnar til svinnið í lívmargfeldinum?

Skriva víðari, har tað er viðkomandi:

- Tryggja fleiri vard øki við at ....
- Verja hótt djóra- og plantusløg við at ...
- Stuðla fátækum londum við at ...
- Innlima lívmargfeldismál í viðkomandi politisk málsøki og stevnuskráir
- Broyta atburðin hjá teimum, ið skaða lívmargfeldið
- Annað:

### Kjak: Hvussu skulu vit fáa bilbugt við óbeinleiðis atvoldirnar til svinnið í lívmargfeldinum?

Skriva víðari, har tað er viðkomandi:

- Tryggja ein burðardyggari búskap við at ...
- Broyta lóggávu og beina burtur eggjan til skaðiligt virksemi við at ...
- Skipa landbúnaðin, so at hann ger minni skaða á lívmargfeldið
- Annað:



"Fleiri og fleiri sløg av súgdjórum doyggja út. Frá 1900 til dagin í dag hevur tað gingið tvífalt so skjótt sum undanfarnu hundrað árini"

2. partur

# Altjóða mál fyri lívmargfeldi

2. partur

# Altjóða mál fyri lívmargfeldi

## Um sáttmálan um lívfrøðiligt margfeldi (CBD-sáttmálin)

CBD-sáttmálin varð undirskrivaður av heimsins stjórnarleiðarum í 1992 á ST-ráðstevnu um umhvørvi og menning, sum var í Rio de Janeiro, saman við sáttmálanum um veðurlagsbroytingar og øðrum týdningarmiklum skjølum viðvíkjandi altjóða umhvørvispolitikki sum til dømis Dagsskrá 21 (Agenda 21), Rio-sáttmálanum, skógarsáttmálanum og eini samtykt um at skriva sáttmála um at seðga oyðimarkarvøkstri. CBD-sáttmálan hava 195 lond og Evropasamveldið undirskrivað. Allir partar uttan USA hava staðfest sáttmálan.

## Endamálini við sáttmálanum

Víddin á sáttmálanum sæst aftur í teimum trimum endamálunum:

1. Lívmargfeldisvarðveitsla
2. Burðardygg nýtsla av lívmargfeldi og tí, ið hartil hoyrir
3. Rættvíst og rímiligt býti av ágóðum, ið standast av at gagnnýta ílegutilfeingi, og verja av rættindunum hjá upprunafólki.

Ein umráðandi táttur í kjakinum um lívmargfeldi snýr seg um atgongd til og býti av teimum ágóðum, ið standast av handilsligari og aðrari gagnnýtslu av ílegutilfari, til dømis heilivági.

Tað mesta av heimsins lívmargfeldi er í menningarlondum, ið síggja tað sum tilfeingi, tey kunnu nýta til at seta ferð á egnan búskap og samfelagsmenning. Søguliga varð plantuílegutilfeingi brúkt til handilslig endamál uttan fyri økið, tað stavaði frá, ella sum ískoyti til plantualing. Útlendskar fyritøkur leitaðu eftir náttúrutilfari at nýta til menning av nýggjum vørum sum til dømis heilivági, og hesar vørur vórðu javnan seldar og vardar av patentum ella øðrum upphavsrætti, uttan at útvegaralandið fekk nakran rímiligan ágóða burturav (Sustaining Life on Earth, SCBD, 2000).

## Býti av ágóðum frá ílegutilfeingi

Sáttmálin viðurkennir, at lond hava fullveldisrætt til egið ílegutilfeingi, og at atgongd til og gagnnýtsla av tí er treytað av fríum og frammanundan kunnaðum samtykki frá útvegaralandinum eins og av sínámillum semju um treytir viðvíkjandi ágóðunum. Hesir ágóðar skulu vera til gagns fyri natúrliga umhvørvið, og útvunna tilfeingið skal nýtast til varðveitsluendamál.

Fyri at tryggja eitt rættvíst býti av ágóðunum, ið standast av ílegutilfeingi, eru partarnir komnir ásamt um, at øll lond/fyritøkur, ið útvinna ílegutilfeingi í øðrum landi, skulu luta út av ágóðunum frá hesum ílegutilfeingi. Henda semja verður nevnd Nagoya-protokollin og er ein avtala undir CBD-sáttmálanum.

Sambært altjóða frágreiðing IPBES verður kortini ikki mett, at avtalurnar hava havt stórvegis jaliga ávirkan á lívmargfeldið.

## Altjóða 2010-2020-lívmargfeldismálini

Í 2010 samtyktu tey 196 londini, ið hava skrivað undir CBD-sáttmálan, eina víðfevnda virkisætlan og 20 mál fyri lívmargfeldi (tey sonevndu Aichi-málini). Í kassa 5 er yvirlit yvir virkisætlanina.

Skjótar vegleiðingar til málini eru tøkar her: **https://www.cbd.int/doc/strategic-plan/targets/compilation-quick-guide-en.pdf.**

## KASSI 2

### Aichi-málini: visjón, missión, strategisk mið og mál í virkisætlanini fyri lívmargfeldi, 2011 – 2020

### VISJÓN

**At liva í samljóði við náttúruna**

Fyri 2050 er lívmargfeldi virðismett, varðveitt, umvælt og gagnnýtt á skilagóðan hátt, ið verjir vistskipanartænastur, heldur klótuna sunna og veitir grundleggjandi ágóðar til øll fólk.

### MISSIÓN

Munagóð og bráðfeingis tiltøk fyri at steðga svinninum í lívmargfeldi og soleiðis tryggja, at vistskipanir gerast mótstøðuførar fyri 2020 og halda fram at veita grundleggjandi tænastur. Sostatt skal heimsins lívfrøðiliga margfeldi eisini tryggjast, vælferð menniskjunnar stuðlast og fátækradømi basast. Fyri at røkka hesum máli skal trýstið á lívmargfeldið linkast, vistskipanir skulu umvælast, lívfrøðiligt tilfeingi gagnnýtast burðardygt, og ágóðarnir frá gagnnýtsluni av ílegutilfeingi býtast rættvíst og rímiliga. Hóskandi fígging skal veitast, førleikar mennast, lívmargfeldismál og -virði innlimast í gerandislívið, hóskandi politikkur fremjast í verki, og avgerðir skulu taka støði í haldgóðum vísindum og meginregluni um fyrilit.

**Mál A**: Viðgera grundleggjandi atvoldirnar til svinnið í lívmargfeldi við at seta lívmargfeldi á breddan á øllum økjum bæði á tingi og í samfelagnum.
**Mál B**: Linka beinleiðis trýstið á lívmargfeldið og eggja til burðardygga nýtslu.
**Mál C**: Betra um støðuna hjá lívmargfeldinum við at verja vistskipanir, djóra-/plantusløg og ílegumargfeldi.
**Mál D**: Økja um ágóðan til øll av lívmargfeldi og vistskipanartænastum.
**Mál E**: Økja um íverksetan við luttakaragrundaðari tilrættislegging, vitanarumsiting og førleikamenning.

### Yvirlit yvir Aichi-lívmargfeldismálini



| Goal | Target | Target element (abbreviated) | Poor | Moderate | Good |
|---|---|---|---|---|---|
| A. Address the underlying drivers | 1 | 1.1 Awareness of biodiversity | | | |
| | | 1.2 Awareness of steps to conserve | | | |
| | 2 | 2.1 Biodiversity integrated into planning | | | |
| | | 2.2 Biodiversity integrated into accounting | | | |
| | | 2.3 Biodiversity integrated into reporting | | | |
| | 3 | 3.1 Harmful subsidies eliminated and reformed | | | |
| | | 3.2 Positive incentives developed and implemented | | | |
| | 4 | 4.1 Sustainable production and consumption | | | |
| | | 4.2 Use within safe ecological limits | | | |
| B. Reduce direct pressures | 5 | 5.1 Habitat loss at least halved | | | |
| | | 5.2 Degradation and fragmentation reduced | | | |
| | 6 | 6.1 Fish stocks harvested sustainably | | | |
| | | 6.2 Recovery plans for depleted species | | Unknown | |
| | | 6.3 Fisheries have no adverse impact | | | |
| | 7 | 7.1 Agriculture is sustainable | | | |
| | | 7.2 Aquaculture is sustainable | | | |
| | | 7.3 Forestry is sustainable | | | |
| | 8 | 8.1 Pollution not detrimental | | | |
| | | 8.2 Excess nutrients not detrimental | | | |
| | 9 | 9.1 Invasive alien species prioritized | | | |
| | | 9.2 Invasive alien pathways prioritized | | Unknown | |
| | | 9.3 Invasive species controlled or eradicated | | | |
| | | 9.4 Invasive introduction pathways managed | | | |
| | 10 | 10.1 Pressures on coral reefs minimized | | | |
| | | 10.2 Pressures on vulnerable ecosystems minimized | | | |
| C. Improve biodiversity status | 11 | 11.1 10 per cent of marine areas conserved | | | |
| | | 11.2 17 per cent of terrestrial areas conserved | | | |
| | | 11.3 Areas of importance conserved | | | |
| | | 11.4 Protected areas, ecologically representative | | | |
| | | 11.5 Protected areas, effectively and equitably managed | | | |
| | | 11.6 Protected areas, well-connected and integrated | | | |
| | 12 | 12.1 Extinctions prevented | | | |
| | | 12.2 Conservation status of threatened species improved | | | |
| | 13 | 13.1 Genetic diversity of cultivated plants maintained | | | |
| | | 13.2 Genetic diversity of farmed animals maintained | | | |
| | | 13.3 Genetic diversity of wild relatives maintained | | | |
| | | 13.4 Genetic diversity of valuable species maintained | | Unknown | |
| | | 13.5 Genetic erosion minimized | | | |
| D. Enhance benefits to all | 14 | 14.1 Ecosystems providing services restored and safeguarded | | | |
| | | 14.2 Taking account of women, IPLCs, and other groups | | Unknown | |
| | 15 | 15.1 Ecosystem resilience enhanced | | Unknown | |
| | | 15.2 15 per cent of degraded ecosystems restored | | Unknown | |
| | 16 | 16.1 Nagoya Protocol in force | | | |
| | | 16.2 Nagoya Protocol operational | | | |
| E. Enhance implementation | 17 | 17.1 NBSAPs developed and updated | | | |
| | | 17.2 NBSAPs adopted as policy instruments | | | |
| | | 17.3 NBSAPs implemented | | | |
| | 18 | 18.1 ILK and customary use respected | | | |
| | | 18.2 ILK and customary use integrated | | Unknown | |
| | | 18.3 IPLCs participate effectively | | Unknown | |
| | 19 | 19.1 Biodiversity science improved and shared | | | |
| | | 19.2 Biodiversity science applied | | Unknown | |
| | 20 | 20.1 Financial resources for Strategic Plan[a] increased | | | |

**Mynd 4.** IPBES-meting av Aichi-málunum
(Kelda: IPBES, 2019)

### Støðumynd av, hvussu langt er komið við virkisætlanini og Aichi-lívmargfeldismálunum

Virkisætlanin og tey 20 lívmargfeldismálini fara úr gildi í 2020, og frágreiðingin staðfestir, at tey eru langt frá rokkin. (Mynd 4).

Málini, ið vit eru tættast við at røkka, eru tey við greiðum stevnumiðum, ið lættliga kunnu mátast, og viðfestum avleiðingum fyri londini, ið ikki røkka teimum. Tó hava vísindini gjørt vart við, at støðumetingar av miðum við eittans tali ásettum sum máli kunnu vera villleiðandi:

Metingin "GOOD" hjá IPBES til mál 11.1 og 11.2 (sí Mynd 4) sigur okkum bert, at á heimsstigi eru vit nær við at hava friðað 17% av jarðarskorpuni og 10% av høvunum. Tó eru ábendingar um, at meira enn ein triðingur av friðaðum lendi er týnt vegna ov vánaliga vernd og umsiting. Trupulleikin er javnan ólóglig viðarhøgging í friðaðum skógum, ólóglig fisking í friðaðum vøtnum og landbúnaður inni á friðaðum øki, har tom djór kappast við villu djórini um beiti. Slíkt óburðardygt virksemi og misnýtsla av náttúrutilfeingi á friðaðum øki fer oftast fram, har fátækradømi, stríð, politiskur veikleiki og rotinskapur valda.

Hinvegin er lítið og einki framstig at hóma viðvíkjandi teimum breiðaru, minni ítøkiligu málunum, ið krevja longri tilgongd. Tað eru til dømis mál viðvíkjandi grundleggjandi atvoldunum til svinnið í lívmargfeldi, og sostatt hava tey við djúpari samfelagsviðurskifti at gera sum til dømis nýtslu- og framleiðslumynstur og burturbeining av skaðiligum veitingum – mál, sum sambært altjóða frágreiðingini eru alneyðug at viðgera.

### Ein nýggj altjóða avtala fyri náttúru og fólk

Hvørja kós halda altjóða samráðingarnar í løtuni?

1. Tað tykist at vera breið undirtøka fyri at innlima eftir-2020-avtaluna í 2030-dagsskránna fyri burðardygga menning og hennara mál fyri burðardyggari menning (SDG).
2. Tað tykist at vera undirtøka fyri at varðveita verandi Visjón 2050: At liva í samljóði við náttúruna.
3. Breið undirtøka er fyri, at nýggju málini skulu ikki vera minni framsøkin enn verandi mál. Ymisk uppskot verða viðgjørd:
    a. At flestu Aichi-málini ikki eru rokkin (Mynd 4) talar fyri, at hildið verður fram við Aichi-málunum komandi 10 árini.
    b. Tó talar tørvurin á 'kollveltandi broyting', ið nógv hava havt á orði – og sum longu er vorðið slagorð í tilgongdini – fyri at bróta upp úr nýggjum. Harumframt krevja nógv av Aichi-málunum eina longri tilgongd, hvørs úrslit eru torfør at máta.
    c. Eisini verður talað fyri at seta fleiri sonevnd SMART-mál. SMART stendur fyri Specific, Measurable, Attainable, Realistic og Time-bound (greið, sjónlig, tøk, saklig og tíðarbundin).

Niðanfyri eru úrvald evni, ið kunnu koma til viðgerðar í tilgongdini at evna nýggja sáttmálan:

**Friðað øki á landi og sjógvi**

Millum fáu Aichi-málini fyri 2020, sum hava víst úrslit, er mál 11 um at friða ávikavist 17% og 10% av øllum land- og sjóøki. Men mong meta málið at vera ov lítið framsøki, tá ið hugsað verður um heildarmyndina og tað, ið krevst fyri at steðga týningini av okkara lívmargfeldi.

Í nýútgivnu vísindagreinini "A Global Deal For Nature: Guiding principles, milestones, and targets" (https://advances.sciencemag.org/content/5/4/eaaw2869/tab-pdf) verður mælt til at friða upp í 50% av heimsins lendi fyri at røkka málunum í París-sáttmálanum og samstundis tálma týningini av djóra- og plantusløgum. Økini, ið talan er um at friða, eru til dømis búøki so sum mangrovur, frostmýrilendi, torvlendi, gamalt graslendi og norðan- og tropiskir regnskógir, ið goyma ovurstórar nøgdir av vakstrarhúsgassi og eru avbera lívmargfeldir.

Men friðaðu økini umboða bert ein lítlan part av øllum teimum økjum, ið hava týdning fyri lívmargfeldi, og tey verða javnan illa umsitin (sí omanfyri). Friðað øki, ið liggja nærhendis vøkrum landsløgum og fossum eru sjáldan búøki hjá tí mest hótta ella viðkvæmasta lívmargfeldinum. Tískil er tørvur á at seta nýggj framsøkin mál um friðað øki eftir 2030 – eisini tí at friðað øki gera góðan mun í stríðnum fyri at avmarka og laga okkum til veðurlagsbroytingarnar.

Størsta avbjóðingin í sambandi við at friða meira øki er tann støðugt vaksandi eftirspurningurin eftir land- og sjóøki til matframleiðslu til tess at metta heimsins íbúgvar, sum støðugt økjast í tali.

**Vistfrøðiliga fótasporið**

Lívmargfeld lond eru javnan menningarlond við stórum fátækradømi og stórum fólkavøkstri, ið leggja trýst á náttúrutilfeingi og lívmargfeldi. Men fólk úr ríkum londum seta eisini vistfrøðilig fótaspor, ið eru skaðilig fyri lívmargfeldið í menningarlondunum, vegna stóra eftirspurningin eftir mat-, klædna-, elvørum osfr.

**Vinnunnar luttøka í lívmargfeldismálum**

Vinnan og privati geirin hava stóra ábyrgd í stríðnum fyri at verja lívmargfeldi. Fyritøkur framleiða, veita og gera íløgur í hentari umhvørvistøkni, men skaða eisini javnan lívmargfeldið við sínum vinnuliga virksemi og avgerðum.

Harumframt eru fyritøkur bæði ávirkaðar og bundnar av tænastum frá vistskipanum og tí lívmargfeldi, tær byggja á. Dømi um vinnur, ið eru beinleiðis treytaðar av sunnum vistskipanum, eru skógarbrúk, fiskivinnan, landbúnaður og vistferðavinnan.

Vælvild frá vinnuni er ein grundleggjandi treyt fyri at menna ein grønari búskap, tí bert við hennara luttøku ber til at seta í verk marknaðargrundaðar loysnir til at varðveita lívmargfeldi og til burðardygga nýtslu.

### Umráðandi spurningar, ið lond og aðrir áhugapartar hava sett í sambandi við tilevningina av nýggju altjóða avtaluni fyri náttúru og fólk

- Hvussu og í hvønn mun skulu nýggju málini endurspegla Aichi-málini?
- Við tí viðurkenning, at nógvir tættir í Aichi-málunum eru umráðandi – eisini fyri nýggju málini – áttu tey at verið umskipað í pyramidusniði við løgum av málum, átøkum og neyðugu umstøðunum í eini 2030-heildarætlan? (Mynd 5)
- Hvussu skulu nýggju málini rúma málunum, ið lond og øki samtykkja hvør sær?
- Hvussu skulu nýggju málini fíggjast, og hvør skal gjalda – hvussu skal ábyrgdarbýtið millum ídnaðarlond og menningarlond vera?
- Hvussu skal eftirlit havast við, um málini verða framd í verki?
- Eigur eftir-2020-avtalan at skipast á líknandi hátt sum París-sáttmálin við regluligum eginásettum tiltøkum (Nationally Determined Contributions), sum javnt og samt skulu víðkast og við jøvnum millumbilum eftirmetast?
- Hvussu skulu nýggju málini lagast eftir øðrum altjóða málum, harímillum París-sáttmálanum og heimsmálunum fyri burðardyggari menning?

**Tættir í eini eftir-2020-lívmargfeldisavtalu**




**Mynd 5.** Tættir í eini eftir-2020-lívmargfeldisavtalu. (Kelda: Discussion paper 'Key Elements and Innovations for the CBD's Post-2020 Biodiversity Framework: A Collaborative Discussion Piece' 2019. https://www.cbd.int/doc/strategic-plan/Post2020/postsbi/birdlife2.pdf)

## Heimsmálini fyri burðardyggari menning og nýggj lívmargfeldismál

Ein nýggj avtala fyri náttúruna er ikki bert eitt CBD-mál.

Tann týdningur og leiklutur, ið lívmargfeldi og vistskipanir hava, síggjast eisini í stóran mun aftur í ST-heimsmálunum, bæði beinleiðis og óbeinleiðis. Leikluturin hjá lívmargfeldinum og vistskipanum er serliga lýstur í heimsmáli 14 (lív í havi) og í heimsmáli 15 (lív á landi).

Av tí at lívmargfeldi og sunnar vistskipanir eru so avgerandi fyri burðardygga menning, kann væntast sambært altjóða frágreiðing IPBES, at verandi neiliga rákið í náttúruni fer at forða fyri framgongd í 80% (35 av 44) av teimum eftirmettu undirmálunum undir heimsmálunum, ið snúgva seg um fátækradømi, hungur, heilsu, vatn, býir, veðurlag, høv og lendi.

2. partur

# Spurningar

## Altjóða mál
## Fyri lívmargfeldi

**Hvussu framsøkin skal nýggja avtalan fyri náttúru og fólk vera?**

- Minni framsøkin enn verandi virkisætlan og Aichi-lívmargfeldismál hennara
- Eins framsøkin sum nú
- Nógv meiri framsøkin

Hví?

**Hvørji mál skal ein nýggj avtala seta?**

Vel teir svarmøguleikar, tú heldur hava størstan týdning

- Tey skulu vera á leið tey somu sum verandi Aichi-lívmargfeldismálini
- Tey skulu vera nógv ítøkiligari og lættari at máta
- Tey skulu vera staðbundin viðvíkjandi lívmargfeldi
- Tey skulu hava ásetta tíðarfreist
- Tey skulu vera løgfrøðiliga bindandi

Onnur hugskot?

**Hvat skal altjóða málið fyri vernd av lendi vera?**

- Eins og tað er (17% av øllum land- og feskvatnsøkjum)
- Friðað øki skulu tvífaldast fyri 2030
- 50% av øllum lendi skal friðast fyri 2030
- Málini skulu taka støði í, hvussu lívmargfeldinum veit við í hvørjum einstøkum øki

Onnur hugskot?

**Skal eitt mál vera fyri ídnaðarlond (og framhaldsmál fyri hvørt land) at minka um vistfrøðiligu fótaspor teirra í menningarlondum?**

- Ja
- Nei

**Hvørji mál – um nøkur – skulu setast fyri at gera nýtslu og framleiðslu burðardygga?**

Vel teir svarmøguleikar, tú heldur hava størstan týdning

- Verandi Aichi-lívmargfeldismálini (at menna ætlanir fyri burðardygga framleiðslu og nýtslu)
- Ítøkilig, saklig mál, ið kunnu mátast
- Uttan mun til, um málið er ítøkiligt og kann mátast ella ikki, skal tað setast við støði í hvørjum einstøkum landi

Onnur hugskot?

→ **Leinki til talgilt spurnablað til 2. part**
**https://nmrnr.wufoo.com/forms/z1ltyqof1rs20xi/**

**Hvussu tryggja vit, at vinnan tekur ábyrgd av náttúruni?**

Vel teir svarmøguleikar, tú heldur hava størstan týdning

- Vinnan skal altíð vera partur av loysnini
- Eitt altjóða mál skal setast fyri at tryggja, at vinnan tekur ábyrgd av náttúruni
- Vinnuligar virkisætlanir skulu leggja upp fyri lívmargfeldi og vistskipanum
- Við lóggávu, ið áleggur vinnuni at verja lívmargfeldi og vistskipanir

Onnur hugskot?

**Skal eyka gjald leggjast á framleiðslu, ið er skaðilig fyri lívmargfeldi og vistskipanir?**

- Ja
- Nei

**Um tú kundi valt, hvat hevði tú so raðfest fremst, sum altjóða mál fyri lívmargfeldi og alt tað, ið hartil hoyrir?**

- ....
- ....

Hví?



"Síðan ár 1800 er samlaði vøksturin av fuglasløgum, sum doyggja út, trýfaldaður"

3. partur

# Ungdómsluttøka og ábyrgd

# 3. partur
# Ungdómsluttøka og ábyrgd

## Ungdómsluttøka

Ein serstakur táttur í sáttmálanum um lívfrøðiligt margfeldi er áheitanin um luttøku frá felagsskapum, ið eru óheftir av politiskum myndugleikum, harímillum ungdómsfelagsskapum, upprunafólki o.ø. Henda luttøka tryggjar gjøgnumskygni og er ein viðurkenning av, at sáttmálin ikki kann fremjast í verki av politiska myndugleikanum eina, men krevur undirtøku og íognarskap frá felagsskapum bæði í samfelagnum og vinnuni.

Sonevnda Global Youth Biodiversity Network (GYBN) er eitt altjóða kervi av ungdómsfelagsskapum og einstaklingum, sum eisini taka lut í arbeiðinum. GYBN hevur umleið 300 limafelagsskapir, ið umboða umleið 600.000 limir úr 140 londum tilsamans. GYBN er høvuðsumboðið fyri heimsins ungdóm í samráðingunum viðvíkjandi sáttmálanum. Tey leggja hugsanir og sjónarmið hjá ungdóminum fram undir politisku tilgongdini og hjálpa sostatt ungum fólki at gera mun.

Sí eisini heimasíðuna hjá GYBN:
**https://www.gybn.org/about-gybn**

3. partur

# Spurningar

## Ungdómsluttøka og ábyrgd

**Vilt tú broyta tínar nýtsluvanar, so teir gerast burðardyggari (til dømis við at eta minni kjøt, keypa minni av klæðum, kanna, hvaðani vørurnar, tú keypir, stava, og taka av rættvísari og burðardyggari møguleikum)?**

- Ja
- Nei

**Vilt tú minka títt útlát av vakstrarhúsgassi við at ferðast minni við flogfari?**

- Ja
- Nei

**Vilt tú gjalda meira fyri flogferðaseðlar, um eykagjaldið verður nýtt til at bøta um skaðan, ið CO2-útlátið frá ferð tíni ger?**

- Ja
- Nei

**Heldur tú, at ungdómurin hevur ein umráðandi leiklut, nú nýggja avtalan fyri náttúru og fólk skal fremjast í verki?**

- Ja
- Nei

Hví?

**Áttu ríkisstjórnir at samtykt eina skipan, ið tryggjar, at ung fólk kunnu vera við til at fremja nýggju avtaluna fyri náttúru og fólk í verki?**

- Ja
- Nei

Hví?

**Hvat kunnu hesi gera fyri at hjálpa tær at fáa rættvísari og burðardyggari nýtsluvanar?**

- Ríkisstjórnir:
- Vinnan:
- Politiskt óheftir felagsskapir:
- Granskarar:
- Miðlarnir:

→ **Leinki til talgilt spurnablað til 3. part**
**https://nmrnr.wufoo.com/forms/z94pysm1mafhbp/**

"Síðan ár 1800 er vøksturin í tali av skriðdjórum, sum doyggja út, farin úr nærum ongum til eitt av hvørjum 100 sløgum"



4. partur

# Sambandið millum lívmargfeldi og veðurlagsbroytingar

# 4. partur
# Sambandið millum lívmargfeldi og veðurlagsbroytingar

Veðurlagsbroytingar hava fingið munandi meiri umtalu enn svinnið í lívmargfeldi. Tíðum verður lívmargfeldi mett at vera marglæti, ið má setast til viks og bíða, til stríðið at basa veðurlagsbroytingunum er loyst. Men náttúru-týning er ein eins stór hóttan fyri mannaættina, sum veðurlagsbroytingarnar eru. Lívmargfeldi og veðurlag eru bæði avgerandi fyri burðardygga menning, og tí eru bæði eisini avgerandi fyri at røkka ST-heimsmálunum.

Harumframt er nógv ymiskt samband ímillum lívmargfeldi og veðurlagsbroytingar:

1. Veðurlagsbroytingar eru millum størstu hóttanirnar móti lívmargfeldi, og tær herða hinar fimm høvuðshóttanirnar (týning av villum búøkjum á landi og í sjógvi, troyting av djóra-/plantusløgum og vistskipanum, dálking og innræsin djóra- og plantusløg). Altjóða veðurlagsgranskingarstovnurin IPCC metir, at um heimsins miðalhiti hækkar 2°C , er tað hættisligt fyri nógvar verur – munandi hættisligari, enn um hækkingin 'bara' er 1,5°C. IPCC metir til dømis, at um hitin hækkar 1,5°C, fara meira enn 70% av heimsins korallrivum at hvørva, men hækkar miðalhitin 2°C, doyggja meira enn 99%!

2. At varðveita lívmargfeldi kann avmarka veðurlagsbroytingarnar og hjálpa fólki at laga seg til tær.

    a. At tálma svinninum og týningini av villum tropuskógum er sjálvandi ein vinn-vinn loysn. Frumskógir eru lívmargfaldastu vistskipanirnar á landi, og samstundis súgva og goyma teir stórar nøgdir av kolevni. Harumframt eru skógir umráðandi fyri vatnrenslið í økinum, har teir eru, og teir køla veðurlagið á staðnum við luftvætu, avseting, avfalli og skugga.

    b. Viðvíkjandi tillaging veita óskalaðir skógir fólki skjól fyri stormum, vatnflóðum og øðrum ógvusligum veðurfyribrigdum, ið standast av skiftandi veðurlagnum. At friða frumskógir kann sostatt hava trífalt endamál: at varðveita lívmargfeldið, avmarka veðurlagsbroytingarnar og hjálpa við tillagingini til teirra.

3. Skjótar loysnir fyri at avmarka og tillaga veðurlagsbroytingarnar kunnu hava neilig árin á lívmargfeldið. Fyri at forða miðalhitanum í at hækka meira enn 1,5 ella 2 hitastig, má $CO_2$ í vaksandi mun takast út úr lofthválvinum. Ein av mest framkomnu hættunum at fáa hetta í lag er at planta orkugrøði til **lívfrøðiliga orku við kolevnistøku og -goymslu** (**BECCS**). Hetta minkar møguliga um koltvísúrnið í luftini, men tað krevur eisini nógv lendi at vaksa á við sera lítlum lívmargfeldi. Viðarlundir, har sum dúvað verður upp á eina og somu plantu í langa tíð fyri at súgva $CO_2$ úr luftini, er eisini eitt dømi.

Tað er umráðandi at minnast til, at viðarlundir ella órógvaðir skógir ongantíð verða eins lívmargfeld sum villskógir, frumskógir og annað gamalt skógarlendi. Órørdir skógir við gomlum vøkstri hava ymiskar eginleikar, sum yngri órógvaðir skógir ikki hava. Ein gamal skógur hevur fleiri sløg av trøum í ymiskum aldri og fleiri fallin og fúnandi trø eins og trø við djúpari rótum og størri miðalhædd.

Alt hetta er avgerandi fyri umhvørvið á staðnum. Tað gevur fleiri ymisk búøki, veitir týdningarmikil føðsluevni, betri frárensl og lufting av jørðini og aðrar ágóðar. Og hesir ágóðar betra um livikorini og sannlíkindi fyri, at størri mongd av verum í



umráðnum hórar undan (https://online.unity.edu/benefits-protecting-old-growth-forests-sustainability-studies/).

**Sínámillum sambandið millum veðurlagssáttmálan og sáttmálan um lívfrøðiligt margfeldi (CBD)**

Tætta sambandið millum veðurlagsbroytingar og lívmargfeldi merkir, at tað er ein greiður fyrimunur at loysa bæði málini í samstarvi og á ein hátt, ið gagnar báðum samstundis.

Nógv halda fyrimunirnar við slíkum samstarvi vera sjálvsagdar, men søguliga hevur arbeiðið viðvíkjandi teimum báðum sáttmálunum verið merkt av vantandi trúnaði og vilja til samstarv. Vaksandi politiski áhugin fyri lívmargfeldi, ið altjóða frágreiðingin við sínum denti á sínámillum sambandi hevur vakt, eins og serfrágreiðingin hjá IPCC um avleiðingarnar av, at miðalhitin hækkar 1,5°C (https://report.ipcc.ch/sr15/pdf/sr15_spm_final.pdf), fer møguliga at slóða fyri betri samstarvi teirra millum.

Greið mál, ið kunnu mátast, í nýggju avtaluni fyri náttúru og fólk kundu tikið hædd fyri samstarvi í arbeiðinum viðvíkjandi teimum báðum sáttmálunum og veðurlagsdagsskránni. Serliga um ein skipan til at hava eftirlit við og máta framstigini í ymsu londunum fyri at røkka málunum eisini fylgdi við.

Viðvíkjandi eftirlitinum við framstigunum kunnu vit læra av París-sáttmálanum. Høvuðstættirnir í París-sáttmálanum eru yvirskipaða málið um

at halda hækkingina í miðalhitanum á jørðini væl undir 2°C, helst undir 1,5°C, saman við kravinum, ið áleggur øllum londum at samtykkja, boða frá og seta í verk egin tiltøk. Hesi tiltøk skulu støðugt víðkast, og londini skulu við jøvnum millumbilum lata inn frágreiðing um framstig síni.

Fimta hvørt ár skal ein felags heildarstøðumeting av arbeiðinum gerast, og við støði í henni verður avgjørt, hvørji stig skulu takast haðanífrá. Sáttmálanum um lívfrøðiligt margfeldi vantar serliga kravið um støðugt víðkað tiltøk og eina altjóða skipan at meta um tiltøkini hjá einstøku londunum. Higartil hava nógv lond verið ímóti altjóða eftirliti við umsiting síni av lívmargfeldi.

Veðurlagslóggáva við løgfrøðiliga bindandi málum, ið summi lond hava samtykt, kundi givið íblástur til líknandi lóggávu viðvíkjandi lívmargfeldi.

Eginásettu tiltøkini (Nationally Determined Contributions) eru kjarnin í París-sáttmálanum og í avrikinum frá langtíðarmálum hansara. Eginásettu tiltøkini umboða íkastið frá hvørjum einstøkum landi at tálma sínum útláti og laga seg til avleiðingarnar av veðurlagsbroytingunum. París-sáttmálin (Grein 4, stk. 2 – https://unfccc.int/sites/default/files/english_paris_agreement.pdf) áleggur øllum pørtum javnt og samt at fyrireika, boða frá og seta í verk tey eginásettu tiltøkini, ið tey ætla at fáa í lag.

Eginásettu tiltøkini byggja á sjálvbodnar ætlanir hjá einstøku londunum – eitt hugskot, ið kom á breddan eftir eina áheitan undir UNFCCC-avgerðunum til veðurlagsráðstevnuna COP19 í Varsjava tvey ár framman undan veðurlagsráðstevnuni í París í 2015. Skipanin er eitt sterkt politiskt amboð, tí hvørt íkast boðar øðrum londum, ráðharrum, borgarstjórum og vinnurekandi frá, at umleggingin til ein mótstøðuføran kolevnisfrían búskap stendur fyri durum.

Men UNFCCC hevði onga áheitan um, at eginásett tiltøk eisini skuldu fevna um lívmargfeldi ella náttúru ella hava samband við Aichi-málini ella heimsmálini.

Tó hava nógv lond víst, at tey skilja sínámillumsambandið harímillum, og tey hava í sambandi við síni eginásettu tiltøk ella við atliti at sínum útláti ella at, hvussu stór hóttanin frá veðurlagsbroytingunum er fyri vistskipanir teirra, í størri og minni mun eisini sett tiltøk í verk fyri at varðveita lívmargfeldið ella verja náttúruna.

4. partur

# Spurningar

## Sambandið millum lívmargfeldi og veðurlagsbroytingar

**Hvat heldur tú størstu avbjóðingina fyri framtíðarvælferðina hjá okkum menniskjum vera?**

- Minkandi lívmargfeldi
- Veðurlagsbroytingar
- Tey bæði eru líka átrokandi
- Tey bæði kunnu ikki samanberast
- Beinleiðis og óbeinleiðis atvoldir til minkandi lívmargfeldi og veðurlagsbroytingar
- Aðrar avbjóðingar?

**Hvørji tiltøk mugu setast í verk fyri at basa veðurlagsbroytingunum og verja lívmargfeldið?**

Vel teir 3 valmøguleikarnar, ið tú metir hava størsta týdning

- Veðurlagsatlit skulu innlimast í viðkomandi politisk málsøki (landbúnað, flutning, orku o.s.fr.) eins og í ætlanir og politikk viðvíkjandi lívmargfeldi
- Lívmargfeldisatlit skulu innlimast í landsins veðurlagspolitikk og -ætlanir
- Landsumfevnandi og løgfrøðiliga bindandi karmar fyri bæði veðurlag og lívmargfeldi
- Samfelagið og ungdómurin mugu gerast meiri tilvitað um hesi mál og um sín egna leiklut
- Búskaparpolitikkur skal leggja upp fyri bæði veðurlagi og lívmargfeldi
- Altjóða skipanir skulu tryggja eitt sterkt samband millum veðurlag og lívmargfeldi
- Altjóða veitingar til frama fyri lívmargfeldis- og veðurlagsverkætlanir
- Onnur hugskot?

**Átti arbeiðið viðvíkjandi veðurlagssáttmálanum og sáttmálanum fyri lívmargfeldi at verið samantvinnað til tess at røkka betri úrslitum á økjum, sum viðvíkja báðum?**

- Ja
- Nei

→ **Leinki til talgilt spurnablað til 4. part**
**https://nmrnr.wufoo.com/forms/zz5m8ja0t37dua/**



“Síðan ár 1900 er vøksturin í tali av fiskasløgum, sum doyggja út, farið úr nærum ongum til eitt av hvørjum 100 sløgum”

5. partur

# Amboð til at fremja eina nýggja avtalu fyri náttúru í verki

# 5. partur
# Amboð til at fremja eina nýggja avtalu fyri náttúru í verki

## Hvussu fremja lond CBD-sáttmálan og lívmargfeldismál hansara

Amboðini, ið eru til taks fyri at fremja CBD-sáttmálan og fyri at hava eftirlit við lívmargfeldismálunum, eru heldur øðrvísi enn tey, ið fylgja við París-sáttmálanum. Eingi revsitiltøk eru at seta í verk ímóti teimum, ið ikki eftirlíka sáttmálanum ella røkka málunum í honum, men londini leggja egnar, óbindandi virkisætlanir fyri, hvussu tey skulu røkka lívmargfeldismálunum – sonevndar National Biodiversity Strategy and Action Plans (NBSAPs) – og eftirmetingum av avrikunum skipa londini eisini fyri hvør í sínum lag (landsfrágreiðingar).

**Fráboðanarskipan**

CBD-sáttmálin áleggur londunum at boða frá støðuni í lívmargfeldi sínum. Fjórða hvørt ár eigur hvørt landið at lata inn eina 'landsfrágreiðing': https://www.cbd.int/reports/

Partarnir hava gjørt eina vegleiðing til, hvussu frágreiðingin skal gerast, men vegleiðingin er, sum orðið sipar til, bara vegleiðandi, ikki bindandi, og tí eru frágreiðingarnar frá ymsu londunum ofta sera ójavnar. Hetta ger tað trupult at máta neyva íkastið frá hvørjum landi sær í arbeiðinum at røkka málunum.

**Virkisætlanir fyri lívmargfeldi (NBSAPs)**

Øllum londum er álagt at leggja ætlanir fyri og almannakunngera, hvussu tey skulu verja lívmargfeldið – eina sonevnda virkisætlan fyri lívmargfeldi ella "National Biodiversity Strategy and Action Plans" (NBSAPs). Londunum er álagt at leggja hesar ætlanir og at greiða frá, hvussu tey skulu innlima náttúruvarðveitslu og burðardygga nýtslu av lívmargfeldinum á ymisku politisku málsøkjunum.

Metingar av hesum virkisætlanum staðfesta, at londini ikki eru komin langt áleiðis við innlimingini.

Eitt jaligt rák hevur tó tikið seg upp, sum er, at fleiri lond eru farin at smíða serliga lóggávu viðvíkjandi lívmargfeldi fyri at tryggja løgfrøðiliga bindandi átøk fyri lívmargfeldið og fyri at binda ríkisstjórnir sínar til at verja lívmargfeldið. Virkisætlanirnar hjá ymsu londunum kunnu takast niður her: https://www.cbd.int/nbsap/default.shtml

**Lyfti**

CBD-sáttmálin hevur onga skipan við eginásettum tiltøkum eins og París-sáttmálin, men virkar við sjálvboðnum lyftum. Tey kunnu vera alskyns sløg av lyftum, og eingin formlig skipan er fyri, hvussu tey skulu gerast, ella fyri at hava eftirlit við, um tey verða hildin.

**Fíggjarligar skyldur**

Í óbindandi grein í CBD-sáttmálanum stendur, at menningarlond hava rætt til nýggjar og fleiri fíggjarligar veitingar frá ídnaðarlondunum til tess at røkja skyldur sínar sambært sáttmálanum. Sambært menningarlondunum eru hesar veitingar tó ikki gjørdar tøkar. Útveganin av nøktandi veitingum til at røkka nýggjum málum og til førleikamenning í menningarlondum er tí eitt støðugt kjakevni í orðaskiftinum um CBD-sáttmálan.

**Eftirlits**

CBD-sáttmálin hevur onga eftirlitsskipan, sum nógvar aðrar umhvørvisavtalur við meiri ítøkiligum krøvum hava. Eingi revsitiltøk bíða teimum, ið ikki halda reglurnar í sáttmálanum og avgerðunum eftir sáttmálanum. Hetta ger tað trupult at hava eftirlit við, í hvønn mun sáttmálin og mál hansara verða hildin. Náttúruvernd hjá einstøku londunum og veitingar til menningarlond eru tí í stóran mun treytað av vælvild hjá einstøku ríkisstjórnunum.

5. partur

# Spurningar

## Amboð til at fremja eina nýggja avtalu fyri náttúru í verki

**Hvussu tryggja vit fígging til at verja lívmargfeldi í menningarlondum?**

- Menningarlondini skulu hava høvuðsábyrgdina av at tryggja neyðugu fíggingina
- Ídnaðarlondini skulu hava høvuðsábyrgdina av at tryggja neyðugu fíggingina
- Menningar- og ídnaðarlondini skulu býta kostnaðin ímillum sín
- Privata vinnan, ið gagnnýtir lívmargfeldið og ílegutilfeingið, skal vera høvuðsveitari, til dømis gjøgnum ein lívmargfeldisgrunn
  Onnur hugskot?

**Skal landsstýrið binda seg til at steðga svinninum í lívmargfeldi í Føroyum við eini lívmargfeldislóggávu og løgfrøðiliga bindandi málum? (Átøk veðurlagslóggávuni, ið summi lond hava)**

- Ja
- Nei

Hví?

**Skulu londini, ið luttaka á veðurlagsráðstevnuni COP15 í Kina, semjast um eina skipan við eginásettum tiltøkum, ið skulu víðkast fimta hvørt ár, fyri at verja lívmargfeldi? (Eins og skipanin viðvíkjandi veðurlagsmálum í París-sáttmálanum)**

- Ja
- Nei

**Skal altjóða eftirlit vera við framstigunum hjá einstøku londunum at røkka málunum?**

- Ja
- Nei

**Heldur tú, at virkisætlanir (NBSAPs), ið eru løgfrøðiliga bindandi og skipaðar við krøvum um støðugt víðkað átøk (eins og í París-sáttmálanum), høvdu fingið londini at rokkið lívmargfeldismálunum skjótari?**

- Ja
- Nei

Hví?

→ **Leinki til talgilt spurnablað til 5. part**
**https://nmrnr.wufoo.com/forms/z1y6c0b213oa3nj/**

# Tilmælispartur

**Hvat er títt mest átrokandi tilmæli til politikarar?**

- Skriva eitt tilmæli við egnum orðum

→ **Leinki til talgilt spurnablað til tilmælispartin https://nmrnr.wufoo.com/forms/z1goorfb0gzmcec/**

Ískoytisspurningar
# Eftirmetingarpartur

**Var kunningartilfarið gott og upplýsandi?**

- Ja, sera
- Ja
- Nei
- Als ikki

Viðmerkingar?

**Vórðu ymisk sjónarmið løgd fram og viðgjørd við títt borð?**

- Ja, í stóran mun
- Ja
- Nei
- Als ikki
- Viðmerkingar?

**Ert tú sum heild væl nøgd/ur við lívmargfeldisverksmiðjuna?**

- Ja, sera
- Ja
- Nei
- Als ikki
- Uppskot?

**Væntar tú, at politiska skipanin fer at nýta úrslitini frá verksmiðjuni á ein skilagóðan hátt í sambandi við avgerðir í lívmargfeldismálum?**

- Ja, tí eri eg vís/ur í
- Ja
- Nei
- Als ikki
- Tilmæli?

**Hevði tú aftur viljað luttikið í einari slíkari tilgongd?**

- Als ikki, tað er tíðarspilla
- Kanska
- Avgjørt!

→ **Leinki til talgilt spurnablað til Eftirmetingarpartin**
**https://nmrnr.wufoo.com/forms/zkjvsqq129da7j/**

Norðurlandaráðið
Nordens Hus
Ved Stranden 18
DK-1061 København K
www.norden.org

## Saman fram ímóti eini altjóða avtalu fyri náttúru og fólk – Ungdómsluttøka í áseting av málum fyri lívmargfeldi, vistskipanum og burðardyggari nýtslu

Um allan heim eru ungdómar farnir at krevja, at tiltøk verða sett í verk til at verja okkara jarðarknøtt. Í 2020 skal ein nýggj altjóða avtala fyri náttúru og fólk samtykkjast, ið ásetir mál viðvíkjandi verju og varðveitslu av heimsins lívmargfeldi og vistskipanum. Tað hevur avgerandi týdning, at ungdómurin verður hoyrdur í sambandi við hesar ásetingar, tí avleiðingarnar fara ikki bert at raka verandi ættarlið, men eisini framtíðar ættarlið og lívsgrundarlag teirra.

Í Norðurlondum vilja vit tryggja, at ungdómurin verður hoyrdur, og tískil hava vit evnað hetta tilfar, ið er ætlað til at økja um ungdómsluttøkuna í arbeiðinum við at seta nýggj mál fyri vernd og burðardygga nýtslu av lívmargfeldi og vistskipanum og harvið tryggja eina nýggja altjóða avtalu fyri náttúruna og heimsins íbúgvar. Hetta tilfar er ætlað ungdómi og teimum, ið vilja skapa karmar um ungdómsluttøku í tilevningini av eini nýggjari altjóða avtalu fyri náttúru og fólk. Øll, ið vilja skipa fyri, hjálpa til og luttaka í ungdómssamráðingum, eru vælkomin at nýta tilfarið. **Úrslitið kann varpast víðari til teir myndugleikar, ið taka** tær stóru avgerðirnar, til almenningin og til aðrar viðkomandi stovnar, eins og tað verður partur av eini størri, heimsfevnandi ungdómsrørslu.

Endamálið er at stuðla ungdóminum, ungdómsfelagsskapum og øðrum áhugabólkum at veita neyðugu karmarnar fyri samráðingum teirra viðvíkjandi aðaltættunum í eini nýggjari avtalu fyri náttúru og fólk og at tryggja trúvirðið í úrslitunum frá ungdómsverksmiðjunum.

Tilfarið er tilevnað í tøttum samstarvi við Norðurlandaráðið og Norðurlendska ráðharraráðið í samstarvi við norðurlendskan ungdóm.

Umframt tilfarið er ein handbók tøk hjá teimum, ið hava tørv á vegleiðing til at skipa verksmiðjur og samráðingar. Handbókin veitir upplýsingar og vegleiðing um at skipa fyri og fyrireika ungdómsverksmiðjur og luttøku. Tað er ein lagalig handbók, ið er leiðbeinandi og kann nýtast eftir tørvi í samsvari við viðkomandi viðgerðir.

**Handbók: hvussu ungdómssamráðingar verða skipaðar**
**Saman fram ímóti eini altjóða avtalu fyri náttúru og fólk**
*http://urn.kb.se/resolve?urn=urn:nbn:se:norden:org:diva-5689*